Nýtt oljufelag inn á føroyska økið:

Amerikanska Murphy Oil í bólk saman við Texaco/Conoco

Enn eitt útlenskt oljufelag ynskir at vera við í leitingini eftir olju og gassi við Føroyar. Tað er amerikanska felagið Murhpy Oil.

Felagið er farið í samstarv við tvey onnur amerikonsk feløg, Texaco og Conoco.

Hesi bæði feløgini hava leingi leitað sær eftir einum partnar aftrat, og tykist hetta nú at vera komið uppá pláss við at Murphy Oil er komið inn í bólkin.

Umboð fyri tey trý feløgini koma til Føroya í næsta mánað at kunna seg við viðurskiftini her og samtíðis til at tosa við umboð fyri feløg, stovnar og myndugleikar.

Tað er Texaco, sum er operatørur í hesum bólkinum.

Nú hesi trý feløgini hava skipa seg í bólk eru fimm bólkar, sum arbeiða á føroyskum øki.

Hesir eru AMG-bólkurin við Statoil, Mobil og Enterprice - Amerada bólkurin við Amerada Hess, Norsk Hydro, Lasmo og Dong - Finabolkurin við Fina, Mærsk Olie og Gas, Union Texas Oil og Deminex og BP bólkurin, har BP og Shell eru saman. Hesi hava tó ikki eitt so tætt samstarv sum hini feløgini.

Tað eru so eisini fleiri feløg, ið enn ikki hava funnið sær partnarar men sum - eftir tí sum Sosialurin skilur - royna at finna sær onnur oljufeløg at arbeiða saman við.

Hesi eru m.a. Saga, Phillips, Esso, Elf, Amoco, Brittish Gas og Arco.

Tiltøk

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

Rhema, Tórshavn
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti.
Sunnudagin kl. 10.30: Sunnudagsskúli.
Øll eru vælkomin.

Hoyvíkar skúli
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14. Møti verður kl. 18 við Oydis og Martin Olsen. Bønarløta verður hálvan tíma áðrenn møtið.

OASAN
Jónas Broncksgøta 25
Sunnukvøldið kl. 20.30 verður opið hús, har øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Í sambandi við landsstevnuna hjá Sjómanskvinnuringunum verða hesi almennu møtir í Meinigheitshúsinum í Havn.
Í kvøld kl. 19.30: Møti v/ Arna Sørensen. Teir fýra úr Havn syngja.
Leygardagin kl. 10: Bíbliutími við Arna Sørensen.
Leygarkvøldið kl. 19: Møti við Ásu Kristiansen. Manskórið í Meinigheitshúsinum syngur »Í langfarasigling«. Tummas P. Davidsen greiðir frá.
Sunnudagin kl. 16. Møti við Malberg Olsen. Argjakórið syngur.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11: Morgunmøti.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.30: Bøn.
Sunnukvøldið kl. 18: Møti v/ Ben Eli Dam. Exoduskórið syngur.
Mánadagin kl. 17: Smáskotar.
Mánadagin kl. 18.30: Skotar.

Samkoman Sion, Vágur
Sunnumorgun Morgunmøti kl. 11.
Sunnudag Sunnudagsskúli kl. 11.30.
Sunnukvøld kl. 20: Evangeliskur fundur.
Mánakvøld kl. 20: Bønarfundur.
Hoskvøld kl. 20.30: Bønarfundur, hjá Erling Bech, Porkeri.
Telefonandaktin svarar á 73777.

Keldan, Skálafirði
Í kvøld kl. 21: Bøn- og lovsangur.
Leygardagin kl. 18 fer bussur av Strondum til Havnar á Gospel-festival.
Sunnudagin kl. 17 møti v/ Eivind Frøen.
Sunnudagin kl. 17: Barnamøti.

Prógv
Barbara Svensson úr Havn hevur fingið sveinabræv sum hárfríðkari. Hon hevur lært í Hárfríðkanarhøllini í Tórshavn. Lærimeistari var Lydia Danielsen.

Soli Deo Gloria, Klaksvík
Í kvøld kl. 20: Møti v/ Eivind Frøen. Solo Brothers og lovsangsbólkur syngja.
Leygarkvøldið kl. 20.30: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17: Møti v/ Kristoffur Olsen.
Telefonandaktin: 56528
Forbønstænastan: 56514

AA-fundir, Tórshavn
Fundir verða í kvøld kl. 20 og kl. 22.30 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Al Anon, Tórshavn
Fundir fyri avvarðandi av alkoholikarum eru hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21 í Tórsgøtu 5 (inngongd vestanfyri).

Javni
Streymoy
Almennur fundur verður á Hotel Hafnia fríggjadagin 23. mai. Kl. 19.00: Týdningurin av norðurlendskum sambandi og samstarvi. Óli Simonsen og Jórunn Dánjalsdóttir Poulsen. Kl. 20: Aðalfundur.

Javni
Eysturoy
Javnafagnaður verður leygdagin kl. 11 frá Glyvra Skúla og út til Runavíkar Ítróttar- og Samkomuhøll.

Felagið Tórshavn RUDDINGARDAGUR
Ruddað verður úti á Reyni, á Tinganesi og á Skálatrøð. Vit hittast á Kunningarstovuni leygardagin kl. 10.

Gongutúrur Hvalba–Trongisvágur
Suðuroyar Kunningarstova skipar fyri gongutúri úr Nesi í Hvalba leygardagin 24. mai kl. 14.
Kostnaður 30 kr. fyri vaksin. Tilmelding á Suðuroyar Kunningarstovu, tlf. 72480.

Amnesty International Føroya deild
Skrivstovan er opin:
Týsdag kl. 8.30–12.30
Hósdag kl. 8.30–16.30

VITIN í Århus
Bøn og lovsangur verður fríggjakvøldið 30. mai kl. 19.30 á Langkærvej 32, st. tv. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Vitin 8624-7773

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 31 55 18 09 / fax 31 58 61 49.
Fríggjakvøldið kl. 20 er kristiligur fundur.
Sunnumorgunin kl. 11 er samkomufundur við breyðbróting og sunnudagsskúli kl. 12.30.

Malta, Hirtshals
Sunnudag:
kl. 11: Breyðbróting.
kl. 13: Sunnudagsskúli.
kl. 18: Evangeliskur fundur.
Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti.
2. hóskvøld kl. 19 í hvørjum mánað eru vit í Hygum.
2. fríggjadag í hvørjum mánað kl. 19.30 eru vit í Esbjerg.
2. leygardag í hvørjum mánað kl. 19.30 eru vit í Sønderborg Skolehjem, Sønderlandevej 28, Sønderborg.
Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti.
Samkoman Malta í Hirtshals

Føroyingafelagið í Aalborg
Lille Kongensgade 10B 9000 Aalborg
Opið er mikukvøld kl. 19–22, fríggjadag frá kl. 17–19 og leygarkvøld frá kl. 22–03. Onnur tiltøk verða lýst í felagsblaðnum.

Føroyingar í Noregi
Føroyingar og fólk við tilknýti til Føroyar hittast til óformligan hugna fyrsta leygardag í mánaðinum á Kafe Asylet, Grønland 28, í Oslo.
Norsk-Færøysk Lag skipar fyri tiltakinum.
Felagið hevur tlf. +47 22 67 48 29

Ein tøkk

Hjartaliga takka vit kirkjum og bygdarráðum í hesum bygdum:

Kirkjubø – Vestmanna – Haldarsvík – Eiði Skála – Toftum – Gøtu – Fuglafirði

fyri stórfingna móttøku í sambandi við kórstevnukonsertirnar Kristi himmalsferðardag!

Fyrireikandi kórini í Havn
og
Kórsamband Føroya